# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Ynskja sær tveir heimadystir í juni



*Saman við Jógvani Martin Olsen og Magnus á Stongum fer Ísak Mikladal um vikuskifti til Sveis at samraðast um, hvussu spælast skal í komandi HM-undankapping*

**Umboð fyri FSF fara fyrrapartin leygardagin saman við umboðum fyri hini londini í europeiska HM undankappingarbólki 7 at tingast um skránna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Fríggjadagin fara trý umboð fyri FSF av landinum. Tey fara til Wien, har tað leygardagin fer at verða tingast um, hvussu skráin í HM undankappingini, ið verður á skránni tvey tey næstu árini, skal síggja út.

Ísak Mikladal, aðalskrivari, fer til Wien saman við Jógvani Martin Olsen, landsliðsvenjara, og Magnusi á Stongum, formanni í landsliðsnevndini.

FSF umboðini hava síni ynski við til Wien:

-Vit vilja fegnir hava, at Føroyar kunnu spæla fleiri heimadystir í juni og august, og at vit harvið sleppa undan at spæla fleiri heimadystir tíðliga á vári og seint á heysti, tá ið umstøðurnar at spæla fótbólt ikki eru góðar í Føroyum. FIFA hevur ásett dystardagarnar, sum verða frá á heysti í 2008 og fram til á heysti í 2009. Fleiri av tjóðunum luttaka í EM endaspælinum, sum verður í juni, og hesar tjóðirnar fara neyvan at vilja spæla heimadystir á hásumri.

Ber tað so til at fáa heimadystir longu á hásumri komandi ár?

- Vit vóna, at tað fer at bera til at fáa Serbia og Litava henda vegin kanska longu í juni. Hesar báðar tjóðirnar eru á sama báti sum vit skilt á tann hátt, at tær ikki fara at taka lut í EM endaspælinum í summar, vísir Ísak Mikladal á.

Besta viðførið, sum teir tríggir, sum fara at umboða FSF í Wien fyrrapartin leygardagin, kunnu hava við sær til hús aftur verður altso heimadystir í juni, august og tíðliga í september og útidystir í oktober og november og á vári.

Um tað ikki eydnast fundarluttakarunum í Wien leygardagin at semjast um skránna, so verður tað upp til FIFA í lutakasti at gera av, hvussu skráin skal síggja út.

- Vit heilsaðu upp á umboð fyri hini londini í okkara bólki, tá ið vit sunnudagin vóru í Suðurafrika í sambandi við lutakastið. Tá var breið semja um, at tað skal eydnast okkum at tinga okkum fram til skránna longu leygardagin. Royndirnar vísa, at tað plagar at bera til. Talan er um tingingar, og í tingingum ert tú noyddur at geva fyri at fáa, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandi Føroya.

Í europeiska undankappingarbólki 7 eru Frakland, Rumenia, Serbia, Litava, Eysturríki og Føroyar.

## Pál í top-10

Pál Joensen, sum um vikuskiftið svam seg til trý NM-gull, telist nú millum 10 teir bestu juniorarnar í Europa á trimum teinum. Á seinast dagførda listanum er Pál enntá nummar tvey í Europa á 1.500 metra teininum. Bert ein russiskur svimjari hevur svomið teinin skjótari enn Pál, tá talan er um europiskar juniorar. Og eisini er Pál í top 10 á 400 og 800 metra frísvimjing. Og so skal leggjast afturat, at úrslitini í júst lidnu NM-kappingini ikki eru tald við á listanum. Í hesi kapping svam Pál seg annars til trý gullmerki.

## Rós til Jákup

Í jólamánaðinum hevur danska bold.dk hvønn dag eina lýsing av einum útlendskum spælara, sum hevur gjørt um seg í donsku superliguni. Í dag er tað Jákup Mikkelsen, sum verður umrøddur, og talan er um vøkur orð. Ikki minst frá fyrrverandi Steven Lüstu: - Han havde en enestående teknik af en målmand at være. Jeg har aldrig oplevet noget lignende. Det var sjovt at spille sammen med ham, for du kunne lægge den tilbage til ham på de mærkeligste måder og alligevel kunne han få den pillet ned. Han er en af de bedste målmænd, jeg har spillet sammen med, det er helt sikkert. Jeg tror han kunne have drevet det vidt, men jeg tror desværre, at han havde det der meget ydmyge færøske temperament imod sig. Han havde alle kvaliteterne. Han var god i feltet og lynhurtig på stregen, og så havde han den der fabelagtige teknik, sigur Steven Lüstu, sum eisini hevur spælt saman við málverjum sum Peter Schmeichel og Thomas Sørensen.